# Jólini

## 2019

## Skrá

fyri jóla- og nýggjársshaldið á Tvøroyri

**LEYGARDAGIN 16. NOVEMBER**

**20:00** SALT

Útgávukonsert við Svein í Prestgarði og bólki. Svein gevur út nýggja fløgu, ið hevur fingið heitið “Bønarhendur” og fer at spæla løg av hesi nýggju útgávuni.

**ÓNSDAGIN 20. NOVEMBER**

**19:00** NADDODDANEYSTIÐ

Danski læknin Jørgen Krogh Johansen sigur frá og vísir myndir frá sigling í Grønlandi og Føroyum. Øll eru vælkomin og tiltakið er ókeypis.

**TÓRSDAGIN 21. NOVEMBER**

**20:00** GLASSTOVAN

Bókaframløga. Jan Lamhauge, journalistur, leggur fram bókina “Svik”. Til ber at keypa bókina og fáa hana signeraða.

**LEYGARDAGIN 23. NOVEMBER**

**20:00** SALT

Annika Hoydal fer á pallin í SALT. Við sær hevur hon Jógvan Dahl, Eyðun Mohr Hansen, Torleik Mortensen, , Magnus Jóhannesen og Per Ingvald Højgaard.

**SUNNUDAGIN 24. NOVEMBER**

**17:00** MIÐBÝURIN

Jólatræið í miðbýnum á Tvøroyri verður tendrað. Jólanissan og nissubørnini vitja og geva børnunum pakkar. Bollar og kakao verður at fáa og jólatónarnar skipar Tvøroyrar Hornorkestur fyri. Jónsvein Bech, prestur, sigur nøkur orð.

**FRÍGGJADAGIN 29. NOVEMBER**

**20:00** SALT

“Dialektkvøld”. Fyrilestur v. Jógvan í Lon, professara, og Rakul Skaale, BA í føroyskum. Eisini fer Kári Jespersen at hava ein fyrilestur. Panelprát og tónleikainnsløg verða eisini.

**16:00-21:00** SEGLLOFTIÐ

Framúr væl umtókti jólamarknaðurin á Tvøroyri, har til ber at keypa alskyns heimagjørdar vørur til jóla.

**LEYGARDAGIN 30. NOVEMBER**

**14:00** GAMLA TB-HÚSIÐ

Gongutúrur á Ovara Sevmýri, við Jákupi Jensen sum frásøgufólk. Byrjað verður við gamla TB-Húsið á Sevmýri.

TVØROYRAR KOMMUNA

LEYGARDAGIN **30.** NOVEMBER

**21:00** SALT

Útgávukonsert við fólkarokkbólkinum Hamradun. Bólkurin, við lokala Pól Arna Holm handan mikrofonina, fer at spæla løg av nýggju fløgu teirra, "Hetjuslóð".

LEYGARDAGIN **7.** DESEMBER

**13:00-18:00** NADDODDANEYSTIÐ

Ítrivsstovan hjá Estrid og Sáru. Fyri øll, ið hava hug til at vera eitt sindur kreativ upp til jóla.

**18:00** PLANTASJAN

Árligi jólahugnin í Plantasjuni í Trongisvági. Hugnaliga viðarlundin er karmur um jólatiltak við felagssangi og nissuvitjan. Eisini ber til at fáa sær bollar og kakao.

SUNNUDAGIN **8.** DESEMBER

**16:00** TVØROYRAR KIRKJA

Jólini verða sungin inn í Tvøroyrar Kirkju. Á skránni er kórtónleikur, felagssangur og eitt innslag frá einum tónleikabólki, úr Tvøroyrar Hornorkestri.

TÓRSDAGIN **12.** DESEMBER

**16:00** TVØROYRAR SKÚLI

"Opin skúli". Næmingar og lærarar bjóða øllum í skúlan. Næmingarnir hava gjørt framsýningar av ymsum slag og eisini verður væl umtókta jólakaféin hjá 10. flokki. Øll eru vælkomin.

LEYGARDAGIN **14.** DESEMBER

**20:00** SALT

Jólakonsert í SALT, við Jórun Gudmundsen og bólki hennara. Jórun er úr Sandavági og hevur seinastu árini verið virkin á fø. tónleikapallinum og hevur útgivið fleiri stakløg.

TÓRSDAGIN **19.** DESEMBER

**18:00** SALT

Árliga jólahaldið hjá Tvøroyrar Skúla, verður í SALT. Felagssangur, dansur um jólatræið og vitjan av jólamonnum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

LEYGARDAGIN **21.** DESEMBER

**17:00** TVØRÁKEI

Jólaskipið leggur at Tvørákei, við jólamonnum umborð. Teir práta við børnini og bjóða teimum okkurt leskiligt.

**18:00** NÝGGI SKÚLAGARÐUR

Viðrar, verður jóla-gongutúrur í miðbýnum á Tvøroyri, við Viberg Sørensen sum frásøgufólk. Vit hittast í "nýggja Skúlagarði" í Tvøroyrar Skúla.

TÝSDAGIN **31.** DESEMBER

NÝGGJÁRSHALDIÐ Á TVØROYRI

**14:00** uml. klokkutíð — Árliga "pílagrímsferðin" niðan á Oyrnafjall byrjar við verðstaðið hjá Simo, við Gamlansá. Komin oman aftur, bjóðar Tvøroyrar Kommuna suppu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**23:30** uml. klokkutíð — Kyndlagonga, nýggjársbál, fýrverksshow við Ítróttarhøllina í Trongisvági. Ábit er á skránni aftaná, í skúlahøllini.

## UPP- OG AFTURLATINGARTÍÐIR HJÁ HANDLUNUM Á TVØROYRI

**29. november** **BLACK FRIDAY** Opið til kl. 22:00

**7. desember** Opið til kl. 16:00

**14. desember** Opið til kl. 16:00

**23. desember** Opið til kl. 22:00

**Frá ónsdegnum 18. desember til sunnudagin 22. desember er opið til kl. 20:00**